Neistin-VÍF 32-37(16-19):

# Sámal gjørdi eitt hál

**Í einum vánaligum dysti millum Neistan og VÍF á Hálsi var Sámal Joensen ljóspunktið, ið gjørdi, at talan ikki var um spill av tíð**



*Fyrst og fremst var tað Sámal Joensen, sum var høvuðsorsøkin til sigurin hjá oddaliðnum á Neistanum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tey flestu høvdu helst undan dystinum millum menninar hjá Neistanum og VÍF sunnudagin á Hálsi væntað, at talan fór at gerast um ein lættan sigur til vestmenningar. VÍF vann trygt, men uppgávan gjørdist nokk eitt sindur truplari, enn gestirnir høvdu væntað, og ilt er at meta um, hvat úrslitið hevði verið, um VÍF ikki hevði havt Sámal Joensen við á liðnum.

### Tendraðir neistamenn

Tað sást beinan vegin, tá ið dysturin byrjaði, at neistamenn vóru rættuliga uppsettir til dystin, og at teir ætlaðu at geva oddaliðnum úr Vestmanna harða mótstøðu.

At neistamenn vóru so uppsettir, tóktist koma eitt sindur óvart á vestmenningarnar, sum høvdu ilt við at finna stevið fyrstu løtuna. Verjan hjá VÍF var, fyri at siga tað sum tað var, víðopin fyrstu løtuna av dystinum, og neistamenninir høvdu lætt við at koma til opnar møguleikar.

Men so hvørt funnu vestmenningar stevið, og teir tóku seg fram um Neistan, og serliga ein maður hjá VÍF skaraði framúr. Sámal Joensen tykist at verða komin fyri seg eftir skaðan, ið hann hevði fyrr í hesum kappingarárinum, og sunnudagin var hann tann heilt sentrali spælarin hjá VÍF, sum ferð aftaná ferð snýtti bæði verjuna hjá Neistanum og síðani Jota í málinum. Skotini hjá Sámali sótu sera væl, og onkuntíð borðreiddi hann eisini við onkrari tekniskari snildu, har hann lumpaði fleiri mans í verjuni hjá Neistanum, áðrenn hann setti bóltin í netið. Sámal var heilt stóri spælarin sunnudagin, og serliga í fyrra hálvleiki tá ið hann skoraði ikki færri enn níggju mál upp á ein hálvleik.

### Buha styrkir Neistaliðið

Hjá Neistanum er tað kærkomin styrkur, at Blagoje Buha nú er komin við aftur eftir drúgvan skaðasteðg í heyst. Buha spældi nakrar minuttir í dystinum móti kollfirðingum fyri góðari viku síðani, men tá var lítið um hann. Sunnudagin vísti Buha tó, at hann er við at koma fyri seg aftur, og hann kann verða við til at lyfta Neistan úr botninum.

Sunnudagin spældi buha fyri tað mesta á høgra bakki og ikki á vinstra vongi, sum vit annars kenna hann best fyri. Ikki tí, Buha tóktist trívast væl á plássinum, og átta mál eru heldur ikki av eini leið.

Sum sagt fór VÍF fram um Neistan um miðjan fyrra hálvleik, men neistamenn góvu ikki skarvin yvir. Hóast aftan fyri við trimum málum í steðginum, so royndi heimaliðið at hanga í gestunum, og hevði tað ikki verið fyri nøkrum týðandi bjargingum hjá Dejan í málinum hjá VÍF, so er ikki óhugsandi, at havnarliðið var komið upp á javnt.

Í eini roynd at órógva álopsspælið hjá VÍF fór Neistin undir at verja 4-2 við monnum frammi á ávíkavist Sámali og Inga. Hetta hevði eisini við sær, at álopsspælið hjá vestmenningum gjørdist tilvildarligt, men hinvegin gjørdist tað samstundis ógvuliga rúmligt í verjuni hjá Neistanum, og tað dugdu vestmenningar eisini at gera sær dælt av. Serliga var tað Ingi Olsen, sum hesa løtuna brúkti eitt sindur av sínum mongu royndum og meiri ella minni einsamallur fekk mál burtur úr pressaðu støðunum.

### Góð breidd

VÍF tykist verða ógvuliga væl fyri, og tað skal eisini havast í huga, at sunnudagin var Áki Olsen ikki við vegna leikbann, og Daniel Rapa er heldur ikki við enn. Báðir vóru teir tó millum áskoðararnar. Harumframt er Eli Müller heldur ikki klárur enn, men tá ið hesir tríggir aftur verða at síggja á liðnum hjá VÍF, kann ikki sigast annað enn, at tað sær rættuliga gott út hjá vestmenningum. Komandi vikuskiftið fær VÍF vitjan av kollfirðingum í Vestmanna, og tað plagar ofta at gerast undirhaldandi.

Neistamenn eiga tó eisini eitt sindur av rós fyri dystin sunnudagin. Gamaní eru 37 mál alt ov nógv at lata fara í gjøgnum, men tá ið tað er sagt, so skerst ikki burtur, at avrikið annars hjá Neistanum var eitt tað frægastu seinnu dystirnar. Buha er komin aftur, og tað hevur styrkt liðið, og samstundis tykist tað sum um, at menn nú kenna hvønn annan eitt sindur betur, og av somu orsøk finna hvønn annan lættari á vøllinum. Hugburðurin til dystin móti VÍF var eisini á eini góðari leið, og tað man verða lítið at ivast í, at nøkur stig fer tað at eydnast neistamonnum at fáa til høldar. Sunnudagin fara teir á vitjan hjá StÍF á Skála, og tað er ein sera trupul uppgáva, tí strandingar eru stak væl fyri í løtuni, men fær Neistin nakað burtur úr á Skála, so fer tað uttan iva at lyfta liðið undan næstu dystunum.

### Neistin-VÍF 32-37(16-19)

**Neistin:** Blagoje Buha 8(4), Damir Oros 8(1), Tróndur Kragesteen 6, Freddie Poulsen 3, Helgi Michelsen 3, Ólavur Brimnes 2, Áki Mørk 2
**VÍF:** Sámal Joensen 13(2), Ingi Olsen 7(1), Áki G. Olsen 5, Harald Bjørgvin 4, Agnar Joensen 3, John Zachariassen 3, Karl Johan Djurhuus 2
**Brotskøst:** Neistin 7(5), VÍF 4(3)
**Útvísingar:** Neistin 5, VÍF 7
**Dómarar:** Heri Petersen og Brandur Johansen - Útvísingarnar vóru í fleiri førum dekan ov tunnar, men annars var avrikið hjá hoyvíkingunum á góðari leið.

VÍF-VB 19-30(10-14):

# Eingin ivi

**Vágskvinnur lótu ongan iva verða um, at tær vóru betra liðið, tá ið tær vitjaðu VÍF í Vestmanna.**

SUNSET-KAPPINGIN

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað skerst ikki burtur, at munurin millum tey bæði fremstu liðini í Sunset-kappingini, Stjørnan og VB, og so hini liðini í deildini er rættuliga stórur. Tey bæði oddaliðini eru í einum flokki fyri seg, og útlitini fyri einum óvæntaðum úrsliti í deildini, har annað liðið til dømis snávar, eru ógvuliga smá.

### Greiður styrkismunur

Sunnudagin var VB í Vestmanna og dystaðist við VÍF, og her sást eisini beinan vegin, hvat var betra liðið. Liðini fylgdust fyrstu tíggju minuttirnar, men so fóru gestirnir úr Vági framum, og spakuliga øktist munurin millum liðini bæði.

Í fyrra hálvleiki var munurin kanska ikki so stórur, men eftir steðgin setti VB ferð á, og munurin kom upp um tíggju mál.

Sum ikki einaferð vóru tað útlendskir spælarar, ið gjørdust toppskjúttar. Daiva Tomaite hjá VB er altíð góð fyri eina rúgvu av málum, og sunnudagin var einki undantak í so máta, tí tá skeyt hon ikki færri enn ellivu mál. Hjá vestmenningum var sum vant Ioana Rapa toppskjútti við sjey málum.

Komandi vikuskifti skulu bæði hesi liðini spæla truplar útidystir. Vestmannakvinnur skulu til Havnar, har tær skulu hitta Neistan, og tað verður ikki nøkur løtt uppgáva. Neistin er triðfremsta liðið í kvinnudeildini, og tær hava brúk fyri stigunum, um tær ikki skulu missa sambandið til tey bæði fremstu liðini.

VB skal sunnudagin spæla oddabrak í Klaksvík móti greipuvinnarunum úr Stjørnuni. Tað er neyvan ov nógv gjørt av at siga, at tað verður millum hesi bæði lið, at føroyameistarin verður funnin, og skal VB gera sær vónir um meistaraheitið, so er neyðugt, at tær vinna dystin í Klaksvík, tí annars kann munurin upp til Stjørnuna gerast ov stórur.

### VÍF-VB 19-30(10-14)

**VÍF:** Ioana Rapa 7(2), Fríða Marjunardóttir 4, Kirstin Helgadóttir 3, Finngerð Jensen 2, Annfríða Helgadóttir 1, Linda Johannesen 1, Torgunn Jónolvsdóttir 1
**VB:** Daiva Tomaite 11(4), Rannvá Augustinussen 5, Aukse Vysniaskaite 4(1), Christina Holm 4(2), Laila Jespersen 3, Margreth Augustinussen 3
**Brotskøst:** VÍF 3(2), VB 10(8)
**Útvísingar:** VÍF 2, VB 1
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen